# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

† 

## Andlát og jarðarferðir

**Elsa Midjord av Økrum**, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 18. august, 81 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum, fríggjadagin 22. august kl. 11. Jarðarferðin verður úr Sumbiar kirkju leygardagin 23. august kl. 13 yvir í kirkjugarðin á Leiti. Tey, ið vilja minnast Elsu, kunnu lata kirkjuni eina peningagávu, konta í Suðuroyar Sparikassa.

**Jonna Petersen**, fødd Johannesen, ættað úr Vestmanna, andaðist í heiminum í Munkebo í Danmark 18. august 73 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Munkebo Kirkju leygardagin kl. 11.

**Jóhan Jensen, av Sandi**, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 90 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Jóhan, kunnu lata eina gávu til Leguhúsið í Nesvík. Konta í peningastovnunum.

# Niclas Jespersen 90 ár

Leygardagin 23. august fyllir Niclas Jespersen í Havn 90 ár.

Niclas er hvalbingur. Foreldrini vóru Maria, f. Hovgaard, úr Hovi, og Mortan Jespersen, úr Hvalba.

Sum ungur fór Niclas til Danmarkar á háskúla. Í februar í 1941 varð hann settur í starv sum eykapolitistur í Danmark og tvey ár seinni á fast starv. Hann var politistur í ymsum støðum í Danmark til 1. mai 1948, tá hann søkti um farloyvi.

Í Danmark møtti hann Grethe, f. Petersen, úr Dragstrup í Norðursælandi, og giftust tey í 1942. 1. oktober 1949 varð hann settur kommunalur politistur í



Havn. Stutt tíðarbil var hann politistur á bygd, hann var t.d. í Hvalba, Runavík og í Klaksvík. 1. september 1981 fór hann frá fyri aldur, men var eykapolitistur í fýra ár eftir tað. 1. september 1985 fór hann endaliga úr starvi, 67 ára gamal.

Tey flestu minnast tær sera væl umtóktu barnasendingarnar í SVF um dólgarnar, sum Zacharias Hammer skipaði fyri, har Niclas var politistur. Sendingarnar vóru eins væl umtóktar av vaksnum sum børnum. Niclas hevur stóran áhuga í og hevur fingist nógv við ættargransking.

Grethe og Niclas fingu fýra børn: Sverri, sum búði í Svendborg (Sverri andaðist í 2003, 59 ára gamal), Solveig, sum býr í Fåborg, og Lars og Karin, sum búgva í Havn.

Grethe andaðist í 2004, 79 ára gomul.

Í sambandi við føðingardagin sigur Niclas, at tað hevði glett hann, um onkur kom inn á gólvið í heiminum í Lykkjugerði 9 at heilsa uppá seg ímillum kl. 13-17.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Elsa Midjord**
ættað av Økrum,
búsitandi í Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 18. august, 81 ára gomul.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum, fríggjadagin 22. august kl. 11.00.
Jarðarferðin verður úr Sumbiar kirkju, leygardagin 23. august kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Jákup, Jan, Finnbogi, Hildibjørg og Peturbjørg**

Tey ið vilja minnast Elsu, kunnu lata eina peningagávu til kirkjuna, konta í Suðuroyar Sparikassa.

# Realskúlanæmingar í 1960



Myndaeigari: Jenny Simonsen

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Realskúlanæmingar á ferð í Týsklandi í 1960.

Á myndini eru f.v. Bodil Holm, Karin Joensen, Sigrun Nolsøe, Eydna Dalsgaard, Borgny Djurhuus, frú Kyndal, Eyðfinn Hansen, Jonsvein Jensen, Bjarni Johansen, Jógvan Davidsen og Freddy Cook.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesar myndir, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 392)

**Dagurin**
**22. august. Symphorianus**, deyður í umleið ár 180. Kristin ungur maður úr Autun í rómverska landinum Galliu (Suðurfraklandi). Varð tikin av døgum, av tí at hann ikki vildi tilbiðja skurðgudamyndir í Cybeletemplinum.